**Sig frá 2013 – um alt landið!**

Komandi vikurnar verður skipað fyri tiltøkum kring landið, har greitt verður frá arbeiðinum við heildarætlanini um harðskap í parløgum og nærsambondum.

Øll í Føroyum skulu hava møguleika at kunna seg um ætlanina, sum snýr seg um harðskap í breiðastu merking.

Síðani arbeiðið at seta í verk heildarætlanina byrjaði seinasta vár, hava ymisk tiltøk verið.

Fleiri fakbólkar hava fingið kunning um arbeiðið, eins og ymiskt tilfar er framleitt. Alt hetta til tess at varpa ljós á harðskap.

Greiði boðskapurin er, at harðskapur á ongan hátt verður góðtikin í okkara samfelagi.

Komandi árið skal arbeiðast við at seta í verk viðgerðartilboð til børn. Hetta verður gjørt saman við arbeiðinum at fyrireika Barnahús. Eisini viðgerðartilboð til teirra, sum fremja harðskap, skal setast í verk.

Hesar komandi sjey vikurnar verða tiltøk kring landið, har almenningurin fær høvi at kunna seg um arbeiðið.

Fyrilestrahaldarar frá Gigni, Barnaverndarstovuni, Kvinnuhúsinum, SSP og Amnesty International fara at greiða frá sínum arbeiði og frá harðskapi í breiðari merking. Eisini fer sálarfrøðingur at greiða frá, hví og hvussu harðskap